# EB/Streymur heldur um liðið



*Tað tykist mest sum víst, at EB/Streymur ikki fer at hava nakra stórvegis frágongd til komandi kappingarár*

**Longu nú tykist tað liggja í kortunum, at tað verður á leið sama fólk, sum verður í EB/Streymi komandi kappingarár**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Ein av sólskinssøgunum í bestu mansdeildini hetta kappingarárið má sigast at vera EB/Streymur, sum longu nú hevur tryggjað sær eina søguliga góða endastøðu, og sum kanska enntá kann betra hesa um vikuskiftið.

Orsøkirnar til hetta eru uttan iva fleiri, men tvær teirra munnu í øllum førum vera tilgongdin av leikarum, sum felagið hevði í ár, og ikki minst tilgongdin og búningin av leikarum í egnum røðum.

### Eingi ynskir um at rýma

Um hetta hevur viðført, at onnur feløg hava ligið framvið eftir leikarum hjá EB/Streymi skal vera ósagt, men í øllum førum hevur leiðslan longu nú tryggjað sær, at tað í stóran mun verður av ongum.

Hesa seinastu vikuna hevur felagið nevnliga fingið pappír upp á flestu leikararnar í hópinum, soleiðis at teir eisini framhaldandi verða í felagnum, og sostatt tykjast góð útlit fyri, at positiva gongdin hetta kappingarárið kann halda fram.

Magnus á Stongunum, sum har um leiðir mest av øllum verður róptur fyri »manager« hjá liðnum, tó at hann ikki er partur av nevndini, váttar, at teir í felagnum hava gjørt sáttmála við største partin av hópinum.

- Tað er tó ikki soleiðis, at vit hava spent okkum nógv meira fíggjarliga. Heldur er tað ein umfordeiling av midlunum, soleiðis at allir fáa eitt sindur í part. Tað halda vit eisini, at okkara egnu leikarar hava uppiborið.

- Enn eru vit so ikki heilt lidnir, men vit hava tosað við einstøku leikararnar, og tað var gleðiligt at staðfesta positiva andan, sum tykist valda her. Allir eru positivt innstillaðir upp á eisini at halda fram í komandi kappingarári, og tað kunnu vit ikki annað enn fegnast um, sigur Magnus á Stongunum.

VB-B68:

# Lagnuløta hjá vágbingum

**Rættuliga óvæntað er tað nú komið har til, at møguleikin fyri tvífaldaðari niðurflyting er ikki so langt burtur frá Vágseiði**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*

Tað varð ikki roknað við tí undan kappingarbyrjan, og leingi tóktist tað bara vera ein spurningur um, nær tað fór at venda. Men tað hevur hilnast illa hjá VB, og undan síðsta umfarinum ber ikki til at síggja burtur frá møguleikanum, at fótbólturin í Vági skal fáa finna seg til rættis á øðrum støði næsta ár, enn teir hava gjørt tey seinastu árini.

Hvørki í 1. ella í 2. deild fer VB at flyta niður í dag. Men hjá báðum liðunum er møguleiki fyri, at tey enda á næstaftasta plássinum, og harvið skulu spæla kvalifikatiónsdystir um rættin at halda fram í deildini.

Um VB endar næstaftast í bestu deildini, so skulu teir spæla tvær ferðir ímóti TB um plássið í 1. deild. Tað hava vágbingar einki ímóti at sleppa undan. 2. deildarliðið sleppur sær undan næstaftasta plássinum, um teir ikki tapa ímóti LÍF á Vágseiði í dag. Men um 1. deildarliðið endar í næstbestu deildini, so verður tað líka mikið, hvørja endastøðu næstbesta liðið fer at fáa, tí so skulu teir undir øllum umstøðum flyta niður.

– Sjálvandi verður hugsað um, hví tað hevur gingið so av skriðuni. Men akkurát nú snýr tað seg um at savna allar góðar kreftir um avbjóðingarnar í dag. Tá ið kappingin verður liðug, verður liðug, verður næsta kappingarár viðgjørt, verður sagt úr Vági.

### Øssur framvegis skaddur

VB fær í dag vitjan av B68. Toftamenn hava tryggjað sær luttøku í UEFA Cup næsta kappingarár, uttan mun til um teir enda á øðrum ella triðja plássi. Men teir vilja fegnir vinna silvurkrónurnar. Tí halda teir seg hava nógv at spæla fyri.

Hjá VB eru allir spælararnir tøkir. Eisini Slobodan Madzar, sum var leikbannaður, tá ið VB síðsta vikuskifti tapti á Eiði.

Øssur Hansen er framvegis so mikið skaddur, at tað ikki ber honum til at spæla við B68. Hinir, sum hava verið við tær seinastu ferðirnar, eru tøkir. Fróði Benjaminsen var leikbannaður seinast, men hann er við aftur. Jóhan Petur Poulsen sá reytt eftir neyðbremsu ímóti GÍ, men hann hevur longu sitið leikbannið av sær. Tað gjørdi hann mikukvøldið, tá ið B68 unglingarnir taptu 6–4 í bronsudystinum ímóti GÍ. Dysturin varð spældur á Skála.

Toftamenn síggja uppgávuna í Vági sum so mikið stóra avbjóðing, at teir ætlaðu sær suður til Vágs longu fríggjakvøldið.



*Undan árinum mundi fáur roknað við, at VB í seinasta heimadystinum kom at verða partur av niðurflytingarstriðnum*

Skála-EB/Streymur:

# Nýggj verja á Skála

**Sorin Anghel verður ikki við, tá ið EB/-Streymur á Skála fer at dyrgja eftir fimta plássinum**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*

Á Skála royna teir at savna allar hugsanir og alla orku um setningin, sum teir sjálvir skulu greiða á heimavølli í dag. Tað ræður bara um eitt. Tað er at vinna á EB/Streymi. Um tað ikki eydnast, so skal Skála næsta ár spæla í næstbestu deildini, sum teir fluttu upp úr fyri tveimum árum síðani. Um tað eydnast at fáa øll stigini í dag, so verður tað nóg mikið til í hvussu so er eina viku afturat í bestu deildini. Um tað ikki eydnast FS Vágum at fáa stig í Runavík.

– Tvær tær seinastu ferðirnar hava vit fingið fulla úrtøku. Tað ber sjálvandi við sær, at lagið er betri. Tað hevur verið hugaligt at vant í vikuni, og tað kennist sum um, at tað avgjørt verður roknað við møguleikanum, at tað skal bera til at vinna á EB/Streymi. Í Vágum var tað heilt týðuligt, at eitt sindur meiri varð lagt í, enn tað kanska hevur verið fleiri aðrar ferðir í hesum kappingarárinum, og tað er eingin orsøk at rokna við øðrum, enn at tað eisini fer at verða soleiðis ímóti EB/Streymi. Spurningurin er so, hvussu tað fer at kennast á liðnum hjá okkum, at tað verður neyðugt at broyta so nógv í verjupartinum, siga teir á Skála.

Tað, sum sipað verður til, er, at tríggir av teimum fýra, sum hava verið í aftastu røðini síðani summarsteðginum, eru leikbannaðir í dag. Teir eru Arnhold Berg, sum varð útvístur í Miðvági, og Juian Floresco og Dusan Jaic, sum báðir hava ov nógv gul kort á kontini.

At tað resta fleiri fastir menn ber við sær, at tað verður neyðugt at fara í 3. deild eftir nýggjum spælarum. Skálamenninir í 3. deild hava ikki vant so nógv og støðugt, sum hinir hava vant, men tað er eingin annar møguleiki. Millum spælararnar, sum skulu royna at tetta í verjuni, er Bent Djurhuus, sum spældi nógv á besta liðnum í fjør, men sum ikki hevur gjørt so nógv við fótbóltin í ár.

### Sorin uttanfyri

EB/Streymur er tætt at fimta plássinum. Teir eru aftanfyri KÍ, tí klaksvíkingar hava verið betri í innanhýsis uppgerðunum. Um KÍ einki stig fær í Gundadali í dag, so verður EB/-Streymur omanfyri miðstrikuna, um teir megna javnleik á Skála.

Hjá EB/Streymi er Hallur Jacobsen leikbannaður eftir reyða kortið ímóti VB. Sorin Anghel hevur aftur í ár verið hollur stuðul hjá EB/-Streymi. Men tað er rættuliga ivasamt, um hann verður við í dag. Orsaka av vøddaskaða hevur hann ikki vant í vikuni, og í gjár høvdu teir einki mót um, at hann fór at verða klárur at spæla í dag.

Tá ið skálamenn 6. juli vitjaðu norðuri á Mølini, vann heimaliðið 2–0.

Vikuskifti

Nr. 188 • leygardagur • 4. oktober 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

## Tá ein kirkja fyllir 165 ár

Jústinus Leivsson Eidesgaard hugleiðir í sambandi við, at Oyndfjarðar kirkja ehvur 165 ár á baki.

Lesið síðu 4 & 5



*Sámal og Absalon. Ávíkavist 11 og 13 ára gamlir. Teir kundu gott verið beiggjar, men tó eru teir "bert" fermenningar. Tey vóru í øllum førum mong á Ánaveitsluni, sum hildu, at teir minna nógv um hvønnannan*

# Skyldskapur sást aftur

Leygarkvøldið 27. september var ættarveitsla á Hotel Norð á Viðareiði. Tað var Ána-ættin, sum hittist. Yvir 200 eftirkomarar hjá Heina í Ánunum hugnaðu sær alt kvøldið. At tað kann síggjast, at fólk eru í familju, hóast tað ikki er so nær, munnu teir báðir, Sámal og Absalon, á myndini, vera prógv um

FAMILJA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Ofta verður sagt, at fólk líkjast sum tveir dropar av vatni. Ella hinvegin at systkin eru sum dagur og nátt. Tað er sera ymiskt, hvussu fólk síggja. Onkur kann halda, at eitt barn líkist akkurát mammu síni, og ein annar beint tað mótsatta. Tað er ongantíð til at siga, hvør líkist hvørjum. Tað er sum eyga sær. Men onkuntíð er tað, at ein sær líkheitir á fólki, sum ikki "eiga" at líkjast. Tað vil siga, at tey ikki eru í familju ella so mikið langt úti, at ongin hugsar um, at tey áttu at líkjast. Men eisini tað kann koma fyri.

Eisini er tað ofta, at onkur familja hevur sterkari arvaeindir enn aðrar. Tað vil siga, at tað sást betur á einum hvørjari familju ein er av, enn hjá øðrum. Mangan hava fólk spurt, hvørs barn ein er, og fingið aftursvarið: Ája, tað sæst á skræðuni. Men tað er sum sagt eisini ójavnt frá familju til familju. Men onkuntíð kemur tað fyri, at ein sær líkheitir millum fólk, vaksin ella børn, og tað ikki bara er ein, sum sigur seg síggja tað. Og nevniliga hetta kom fyri á Ánaveitsluni á Viðareiði.

### Minna um hvønn annan

Í Ánaveitsluni vóru tveir ungir dreingir. Ein úr Klaksvík og ein av Viðareiði. Flest øll mundu hava á munni, at teir mintu nógv um hvønn annan. Ikki endiliga líktust teir so nógv, men felagstrekkini eru mong.

Sámal á Tjaldrafløtti Olsen er 11 ára gamal. Hann er miðlingasonur Jóhonnu á Tjaldrafløtti og Hera Olsen í Klaksvík. Absalon Matras Absalonsen er 13 ára gamal. Hann er næstyngsti sonur Sjúrð Matras og Victoriu Absalonsen á Viðareiði.

Umframt at teir báðir venja á sama liði hjá KÍ, kann ikki sigast, at teir hava so øgiliga nógv til felags, tí teir ganga í skúla í hvør sínum stað, og eru teir uppvaksnir ávíkavist í Klaksvík og á Viðareiði.

Og tó - teir eru báðir eftirkomarar hjá Heina í Ánunum. Og tað vil siga, at teir eru fermenningar. Ikki so nær í familju, vildi onkur sagt, men um ein hyggur eftir teimum á myndini, so minna teir ikki sørt um hvønn annan. Tað vildu í øllum førum tey flestu, sum vóru á Viðareiði seinasta leygarkvøld vera við. Og tey, sum kenna báðar siga, at tað er teir minna nógv um hvønnannan í sinni eisini.

Teir báðir sjálvir hildu onki um hóvastákið, sum gjørt varð burtur úr teimum. Men kanska hómaðist ein lítil farri av stoltleika kortini. Teir vóru í øllum førum fegnir um at vera við til veitsluna, og teir hugnaðu sær saman við restini. Og um tað ikki segði teimum so nógv at vera eftirkomarar hjá Heina í Ánunum áðrenn veitsluna, so mundi tað vera broytt nakað aftaná. Tí frágreiðingin frá Jógvani Ósá var so góð og undirhaldandi, at sjálvt børnini sótu still og lurtaðu.

Mangt annað var á skránni hetta kvøldið, og tískil mundi klokkan vera nakað nógv, áðrenn teir báðir garparnir fóru troyttir heim í song. Sámal hevði tó nakað nógv longri veg heim enn Absalon...